UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Málsnr.: 20/02427

Svar upp á fyrispurning, frá Bjarna Kárason Petersen, løgtingsmanni, um stuðul til ferðavinnufyritøkur, ið eru skrásettar eftir 12. mars 2020, (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Fyrispuringur

1. Veit landsstýrismaðurin dømi um fyritøkur, ið eru skrásettar eftir 12. mars, ið hava roynt at søkt um stuðul sambært løgtingslóg um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í samband við COVID-19, men har umsóknin ikki er gingin á møti?
2. Hvør er grundgevingin fyri bert at veita stuðul til fyritøkur, ið eru skrásettar áðrenn 12. mars 2020?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at gera nakað fyri at tryggja at fyritøkur, ið eru skrásettar eftir 12. mars 2020, kunnu fáa stuðul sambært løgtingslóg um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í samband við COVID-19, eins og fyritøkur, ið eru skrásettar áðrenn 12. mars 2020?

Svar

Til spurning 1
TAKS hevur ongar umsóknir fingið frá fyritøkum, ið eru stovnaðar aftaná 12. mars 2020.

TAKS hevur kunnað um á heimasíðuni og hevur upplýst, tá fyrispurningar eru komnir um tað, at stuðul ikki verður latin fyritøkum, ið eru stovnaðar aftaná 12. mars 2020. Tí hevur TAKS ikki fingið nakra umsókn um stuðul frá hesum fyritøkunum.

Skráseting Føroya hevur upplýst, at tað eru 12 feløg, sum eru skrásett eftir 12. mars 2020, og sum sambært endamálsásetingini í viðtøkunum, umframt annað virksemi, reka gistingarhús, matstovuvirki og ferðavinnu.

Tilsamans eru skrásett 218 feløg síðani 12. mars 2020, og nøkur av hesum kunnu væl fáast við ferðavinnu, matstovur ella líknandi.

Tað er sostatt ilt at meta um, hvussu nógvar fyritøkur, ið eru stovnaðar aftaná 12. mars 2020, sum kundu søkt um stuðul, um nevnda avmarking ikki var.

Til spurning 2
Tann 12. mars 2020 boðaði løgmaður á tíðindafundi frá COVID-19 tiltøkum og setti Føroyar munandi niður í ferð. Hetta broytti fortreytirnar fyri at reka vinnu og hevði stórar fíggjarligar avleiðingar, serliga fyri ávísar vinnur. Sostatt varð lóggáva sett í gildi, sum veitti stuðul til tær fyritøkur, har fortreytirnar vórðu broyttar við COVID-19 tiltøkunum. Fyri fyritøkur, sum eru

stovnaðar eftir 12. mars 2020, er ikki talan um broyttar, men um kendar fortreytir, og tí verður bert veittur stuðul til fyritøkur, ið eru skrásettar áðrenn 12. mars 2020.

Til spurning 3
Støðan er ein onnur fyri matstovur og skeinkingarstøð, sum í tíðarskeiðinum 7. august til 31. august 2020 við kunngerð nr. 127 frá 6 august 2020 um avmarkaðar upplatingartíðir og afturlatingartíðir fyri at forða fyri COVID-19 smittuspjaðing, vórðu áløgd at steingja í seinasta lagi kl. 23:00.

Fyri fyritøkur, sum vórðu álagdar at steingja, er talan um broyttar fortreytir. Stuðulin fyri hesar fyritøkur er serliga reguleraður í § 18, stk. 2 í matstovulógini, soleiðis sum ásetingin í § 18, stk. 2 varð orðað við løgtingslóg nr. 107 frá 29. juni 2020 um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin) (Tíðaravmarkað heimild til landsstýrismannin at steingja matstovur og skeinkingarstøð orsakað av COVID-19).

Í løgtingslóg nr. 107 frá 29. juni 2020 varð heimilað fyribils og í avmarkað tíðarskeið at avmarka vanligu upplatingartíðirnar og afturlatingartíðirnar eins og heimilað varð at áseta mest loyvda tal av gestum. Ásett varð í løgtingslógini, at varð avgerð tikin um at avmarka vanligu afturlatingartíðirnar til áðrenn kl. 02.00 ella at minka mest loyvda tal av gestum, hevur viðkomandi fyritøka rætt til stuðul eftir somu reglum, sum eru ásettar í løgtingslóg um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19. Stuðulstíðarskeiðið byrjar, tá ið avgerð fær virknað og endar 31. august 2020.

Við tað, at tað fyri fyritøkur, sum vórðu álagdar at steingja, er talan um broyttar fortreytir, og við tað, at stuðulin í hesum førum er serliga reguleraður í § 18, stk. 2 í matstovulógini, soleiðis sum ásetingin § 18, stk. 2, varð orðað við løgtingslóg nr. 107 frá 29. juni 2020, hava hesar fyritøkur sostatt rætt til at fáa stuðul, hóast tær eru stovnaðar eftir 12. mars 2020. Hesum er tó ikki staðiliga lagt upp fyri í løgtingslógini um stuðul til ferðavinnufyritøkur fyri fastar útreiðslur í sambandi við COVID-19 ella í kunngerðini um stuðulsskipanina.

Stuðulsskipanin verður tí broytt soleiðis, at fyritøkur, stovnaðar eftir 12. mars 2020, sum í tíðarskeiðinum 7. august til 31. august 2020 við kunngerð nr. 127 frá 6 august 2020 vórðu álagdar at steingja í seinasta lagi kl. 23:00, eisini kunnu fáa stuðul. Um neyðugt, verður kunngerðin um stuðulsskipanina broytt í tí sambandinum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 4. desember 2020

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður